Klaksvíkar Ítróttarfelag
Postboks 204
700 Klaksvík
Tlf. 281904/289104
Heimasíða: www.ki.fo

---

## Reglur um dystarklæðir hjá ungdómsdeildini, galdandi frá 1. mars 2015

1. Hesar reglur eru settar í verk, fyri at gera greitt, hvønn politikk KÍ hevur viðvíkjandi dystarklæðum til ungdómslið hjá felagnum.

2. Miðað verður ímóti, at øll ungdómslið (frá U6 til U18) fáa dystarklæðir frá felagnum at nýta. Eitt dystarsett er í minsta lagi ein blusa til hvønn leikara á liðinum.

3. Endamálið við dystarklæðunum er, at á hvørjum liði hava leikararnir eins klæðir t.e. sama snið og merki. Hvør leikari hevur eitt serskilt nummar á blusuni. Hetta fyri at vísa, at KÍ raðfestir samanhald, liðanda og ábyrgdarkenslu.

4. Høvuðsreglan er, at felagið útvegar eitt dystarsett til hvørt lið. Foreldrabólkar kunnu eisini útvega eitt dystarsett í samráð við nevndarlimin fyri ungdómsfótbólt.

5. Tá ið eitt dystarsett verður keypt, so skal einans tað sniðið nýtast, sum felagið hevur avgjørt skal verða galdandi fyri tað einstaka kappingarárið.

6. Ikki er loyvt at seta leikaranøvn á dystarklæðini. Hetta fyri, at dystarklæðini skulu kunna nýtast í framtíðini av øðrum leikarum.

7. Hvørt dystarsett skal verða saman. T.v.s. at leikararnir skulu skiftast um at vaska dystarsettið. Ikki er loyvt at geva leikarum dystarklæðir heim við í hvør sínum lagi at vaska.

8. Dystarklæðir skulu einans nýtast til dystir.

9. Tá ið kappingarárið er liðugt, skulu øll dystarklæðir latast inn aftur í varðveitslu hjá felagnum.

Samtykt av nevndini tann 23. februar 2015.